# avfrúgvin



*Skonnart*





*Galjónsmynd frá »Kristinu«*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

## Umsetingin

Umsetingina til danskt úr týskum hevur Luis Berg, sum var yvirlærari við realskúlan og læraraskúlan í Havn, gjørt. Upprunaskjalið er varðveitt og stendur har í 2. petti: *Nachdem die "Christina" beladen u. im besten seefähigen Zustande stark u. fest, wohl bemannt, u. mit allen zur Reisen Erforderlichen Notwendigkeiten versehen, schleppte die "Christine" um 29. Decb. 82 von Hamburg,* sum Luis Berg hevur umsett so sum oman fyri stendur. Ein rættari umseting hevði tó verið: Efter at "Christina" var ladet og i bedste sødygtig Tilstand, stærk og *tryg,* vel bemandet, og forsynet med alt nødvendigt, der erfordredes til Rejsen, sejlede den fra Hamburg d. 29. Decbr. 1882. Annað er ikki at finnast at í umsetingini hjá Luis Berg, og havi eg tí latið hana vera óbroytta.

## Galjónsmyndin og havfrúgvin

Tá í tíðini høvdu øll handilsskip av týdningi eina galjónsmynd. So eisini "Christina". Hon hevði eina óvanliga vakra galjónsmynd av eini havfrúgv.

H. Montagu Villiers, bretskur umboðsmaður, sigur í bókini "Bretskur konsul í Føroyum" at hann datt um hesa galjónsmynd í einum yvirfløddum kjallara í einum av teimum elstu húsunum í Havn. Hann og húskið høvdu ilt við at finna innivist og búðu eina tíð í Müllers húsi, áðrenn bretska sendistovan, núverandi KFUK, varð smíðað. Tað var í kjallaranum í hesum húsum, hann var dottin um havfrúnna av "Christinu"! Regin Olsen veit at siga frá, at henda sama galjónsmynd var enn í kjallaranum, tá Sjóvinnubankin keypti húsini í 1967.

## Havnarmenn kasta nót eftir havfrúgv

Hesin sami H. Montagu Villier hevur í omanfyri nevndu bók eina sera merkisverda søgu um hesa galjónsmyndina, sum her verður endurgivin:

*Ein søga um eina havfrúgv er serliga stuttlig. Nakrir menn á báti sóu eina havfrúgv í skýmingini; vakra høvur hennara sást væl, og hárið fleyt um hana. Hon tóktist at leggja lítið í, at deyðilig vóru hjá, at teir søgdu øðrum frá hesi sjón. Nógvir sóu hana. At enda gjørdu teir av at fáa fatur á sterkari nót av tí slagnum, sum teir brúka tá ið teir drepa grind, og royna at taka ta vøkru havfrúnna. Djarvar manningar nærkaðust og fingu veruliga fatur á teirri tølandi kvinnuni; men tá sóu teir at hon bert var ein galiónsmynd av stevninum á einum skipi, og at tað flótandi hárið var fastvaksin tari. Eg hoyrdi hesa søguna, einaferð eg datt um hesa somu galiónsmynd í einum yvirfløddum kjallara í einum av teimum elstu húsunum, hagar hon var latin inn við vónbroti sama kvøld, sum hon varð funnin. Hon var veruliga vøkur, og ein kundi hugsað sær, hvussu fullkomið hetta svik var í aldunum; men eingin av hesum monnum hevði farið at tikið hana við nót, um teir ikki høvdu trúð upp á havfrýr.*

Hans Jakob Debes sigur í viðmerking til omanfyri endurgivna brot, at hetta man vera tann galiónsmynd, sum lá í kjallaranum undir gamla Müllers kantóri við Eystaru Vág. Trúliga latin inn til sýslumannin.

Nú er havfrúgvin í tryggari varðveitslu hjá Frank Müller í Havn.

**Prentaðar keldur**:
Henry Montagu Villiers: Bretskur konsul í Føroyum. Umsett av Hans Jacob Debes og við viðmerkingum av sama. Sprotin 2000
.
**Óprentaðar keldur**:
Sjófrágreiðingin: Føroya landsskjalasavn.

Við tøkk til:
Fornminnissavnið
Landskjalasavnið
Frank Müller
Regin Olsen